

Ein av luttakarunum á skeiðnum er Peiris W NuWan C. úr Stri Lanka, sum her heilsar uppá Bjørn Kunoy, ein av stigtakarunum til skeiðið. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# 20 tjóðir á skúlabonk á Setrinum

**Jan Müller**

23.06.2015 - 22:15

Oljan.fo

Mánadagin settust umleið 35 lesandi, granskarar og embætisfólk úr 20 tjóðum, m.a. Suðurafrika, USA, Nigeria, Singapore, Sri Lanka, Bangladesh, Kina, Kanada, Korea, Russlandi, Fiji og eisini Føroyum, á skúlabonk á Fróðskaparsetrinum í Havn. Fyri aðru ferð er sett hol á eitt "Sacs" skeið, "2015 Summer Academy on the Continental Shelf", har leiðandi altjóðarættar serfrøðingar undirvísa, nakað, sum má sigast er eindømi og einki minni enn eitt bragd framt av stigtakarunum, Bjørn Kunoy, Martin Heinesen og Finn Mørk saman við Setrinum og við stuðuli frá oljufeløgunum, Statoil, Dong og Atlantic Petroleum umframt frá samstarvsfelaganum Korean Maritime Institute úr Suðurkorea.

Luttakararnir komu longu til Føroya í vikuskiftinum, og sunnudagin vóru teir útferð í Saksun og aðrastaðni. Undirvísingin, sum fevnir um at nema sær vitan og kunnleika um landsgrunsatlit, byrjaði mánamorgun og endar skeiðið við próvtøku komandi leygardag.

Millum undirvísararnar er ein dómari úr altjóða dómstólinum í Haag, ein professari frá lærda háskúlanum í París, føroyski limurin í Landgrunsnevnd Sameindu Tjóða, Martin V. Heinesen og tveir starvsfelagar hansara, Dr. Walter Roest úr Fraklandi og Dr. Estevao Stefane Mahanjane úr Mozambique umframt føroysku umboðini í sendinevnd Kongsríkisins viðvíkjandi landgrunsmálum, Dr. Bjørn Kunoy, løgfrøðiligur ráðgevi og sendinevndarleiðari, og Finn Mørk, serkønur jarðfrøðingur.

Sostatt verður høvið hjá næmingunum at nema sær vitan frá fremstu serfrøðingunum í heiminum innan teknisk og løgfrøðilig atlit, ið hava at gera við landgrunsrættindi og marknaáseting í landgrunsmálum.

Á stuttari samkomu á Fróðskaparsetrinum sunnumorgunin fingu luttakarar og undirvísarar høvi at greiða frá um seg sjálvi. Tað er greitt, at millum luttakararnar eru serkøn innan landgrunsmál kring allan knøttin og uppgáva teirra minnir ikki sørt um tær hjá okkara egnu fólkum, sum stríðast fyri at fáa Føroyum rættin til stór øki uttan fyri 200 fjórðingamarkið. Eitt av umboðunum fyri kanadisku myndugleikarnar segði frá, at teir júst hava latið inn til landgrunsnevnd ST kandisku krøvini til partar av Arktis, sum Kanada metir hoyra til Kanada.

Sigast má at tað er til miklan sóma fyri bæði Fróðskaparsetrið og fólkini, sum hava fingið hetta skeiðið í lag, at fáa so framstandandi luttakarar og undirvísarar til Føroya í eina heila viku – um somu tíð sum Føroyar bíða eftir at hoyra aftur frá landgrunsnevnd ST um okkara egnu krøv til ytra landgrunnin. Eisini er hetta ein marknasteinur fyri Setrið, sum við slíkum skeiði brýtur upp úr nýggjum og byggir týðandi brýr bæði fakliga og geografiskt.

   
   
   
   
 